gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Útoyggjar taparar í telekapping

**Harða kappingin millum telefeløgini kann hava við sær, at útoyggjarnar fáa verri og dýrari tænastu, heldur Útoyggjanevndin. Stjórin á Føroya Tele sær veruligan trupulleikan fyri framman**

SAMSKIFTI
*Eyðun Klakstein*



*Nýggja telestríðið í Føroyum kann koma at ganga út yvir smáu útjaðaraøkini*

Útoyggjanevndin óttast fyri, at smáu útjaðaraøkini verða afturúrsigld, nú verulig kapping hevur tikið seg upp innan teletænastur.

– Kappingin kann bera í sær, at tey fólkaríku økini, Tórshavn, Runavík og Klaksvík, eru mest áhugaverd sum kundagrundarlag og fáa í boði bæði bíligari og betri tænastur enn restin av landinum, sigur Útoyggjanevndin í sínum áliti.

– Í flestu av teimum smáu oyggjunum er fjarskiftið nøktandi til tann tørvin, sum er í løtuni, men skjótt verður tørvur á nýggjum og meira framkomnum útbúnaði, vísir Útoyggjanevndin á.

## Føroya Tele kroyst

Stjórin á Føroya Tele ásannar, at her er talan um veruligan trupulleika.

– Í løtuni hava flestu av útoyggjunum telefon, fax og uppringt internet, men tað verður ein trupulleiki at veita somu tænastu við skjótum interneti, GSM og øðrum tænastum á smáum plássum sum á meginøkinum, sigur Andras Róin.

– Hini bæði telefeløgini fara at leggja seg eftir kundum í teimum stóru økinum, meðan vit hava veitingarskyldu mótvegis øllum landinum. Vit verða kroystir í hesi kapping, og tað er ein veruligur vandi fyri, at útoyggjarnar ikki fara at fáa somu tænastu sum meginøkið, sigur stjórin á Føroya Tele.

Stjórin á Føroya Tele heldur ikki, at tað er realistiskt at tosa um almennan stuðul til útbyggingar á útoyggjum, so leingi sum Føroya Tele stendur seg væl og hevur stórt avlop.

– Ein møguleiki hevði verið at gjørt sum í øðrum londum, har telefeløgini gjalda pengar í ein grunn, sum skal tryggja útbyggingar í teimum økinum, sum ikki eru so áhugaverd at veita nýggjastu tænasturnar til, sigur Andras Róin.

## Sjálvsagdur tapari

Løgtingsmaðurin, Henrik Old, setti herfyri Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, skrivligan fyrispurning um samskifti. Henrik Old spyr, nær útjaðarin fer at fáa somu kor innan telesamskifti sum miðstaðarøkið.

– Tað er sjálvfylgja, at tað verður útjaðarin, sum fer at verða tapari í øktu kappingini millum telefeløgini. Kappingin verður á teimum stóru plássunum, meðan útjaðarin fer at detta niðurímillum, sigur Henrik Old.

Løgtingsmaðurin vísir í sínum fyrispurningi á, at ein bygd sum Dalur má klára seg við einari telefonlinju, og at GSM og internettænastan er ikki tað sama kring alt landið.

Bjarni Djurholm hevur svarað fyrispurninginum hjá Henrik Old, og hetta svar verður alment á løgtingsfundinum í dag. Bjarni Djurholm vildi fyrrpartin í gjár ikki siga, hvat hann hevur svarað Henrik Old, men hann sigur, at hann hevur gjørt sær ómak við svarinum.


*Innbjóðing til kunningarfund um EINKARRÆTT:*

**Patent**
**Vørumerki**
**Brúksmodell**
**Design**

Patent- og Varemærkestyrelsen skipar saman við TK Stovuni og European Patent Office fyri kunningarfundi

**á Hotel Føroyum**
**Hóskvøldið 26. apríl 2001, kl. 19.00-22.00**

**og**

**á Miðnámsskúlanum í Vági**
**Leygardagin 28. apríl kl. 14.00-16.00**

Fundurin er fyri vinnurekandi og einstaklingar, sum hava serligan áhuga fyri evninum. Fundartíðin er íroknað kaffisteðg.

Henrik Hugger, kunningarstjóri hjá Patent- og Varemærkestyrelsen, og Erik Axen, vinnuframaráðgevi frá PVS, greiða frá, hvussu farið verður fram, tá ein skal taka patent, og hvørja hjálp ein kann fáa í hesum sambandi. Teir viðgera ofta settar spurningar, og somuleiðis vísa teir á, at hesi viðurskifti viðkoma bæði stórum og smáum virkjum.

Hóast fólk ella virkir fáa eitt gott hugskot, merkir tað ikki altíð, at ein skal taka eitt patent. Greitt verður frá ymiskum øðrum møguleikum.

Somuleiðis verður greitt frá, hvussu ein tryggjar sær rættin til eitt vørumerki, eitt brúksmodell og eitt design (klæðir, lampur, ymiskt úr skinni v.m.). Hvat er munurin millum patent og brúksmodell, og nær er tað av týdningi at verja eitt design?

**Tilmelding:**
TK Stovan, **fax** 31 93 63, **tlf.** 31 73 66 ella **teldupost** tk@tk.fo - Tilmelding í seinasta lagi **24. apríl 2001.**
Tiltakið er ókeypis, men neyðugt er at melda seg til frammanundan.

Vinarliga

TK STOVAN

Patent- og Varemærkestyrelsen
Erhvervsministeriet





# Eyðun Elttør heldur røðu í Klaksvík



*Landsstýrismaðurin við oljumálum fer at halda flaggdagsrøðuna í Klaksvík*

**Klaksvík:** Í morgin verður flaggdagshald í Klaksvík, og í ár verður tað landsstýrismaðurin, Eyðun Elttør, sum fer at halda røðuna.

Haldið byrjar í Klaksvíksgarðinum klokkan 15.00, tá Klaksvíkar Hornorkestur og skótar fara at ganga skrúðgongu í Vágstún.

Her fer hornorkestrið at spæla eitt sindur og Eyðun Elttør fer at halda røðuna.

Tað eru skótaliðini í Klaksvík, sum standa fyri flaggdagshaldinum.

**ek**

gult7 cyan7 magenta7 svart7




# RSROKNSKAPUR 2000

## RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar - 31. desember

| DKK | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld** | | |
| Tryggingargjøld brutto | 253.451.512 | 255.657.933 |
| Endurtryggingargjøld | -45.803.204 | -50.507.621 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum brutto | -3.108.784 | -1.537.692 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum hjá endurtryggjarum | 523.113 | -88.135 |
| **Tryggingargjøld netto** | **205.062.636** | **203.524.485** |
| **Rentuinntøka av tryggingarvirksemi** | **8.613.395** | **5.853.384** |
| **Skaðaendurgjøld** | | |
| Útgoldið fyri skaðar brutto | -216.234.062 | -144.422.735 |
| Endurtryggjaranna partur | 43.455.752 | 6.053.398 |
| Broyting í avsettum skaðaendurgjøldum brutto | 3.999.127 | -43.544.641 |
| Broyting í avsettum skaðaendurgjøldum hjá endurtryggjarum | -1.204.216 | 11.483.404 |
| **Skaðaendurgjøld netto** | **-169.983.398** | **-170.430.574** |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi** | | |
| Nýtekningarútreiðslur | -159.127 | -397.663 |
| Fyrisitingarútreiðslur | -63.443.518 | -61.309.172 |
| Ómaksløn og avlopsbýti frá endurtryggjarum | 3.342.924 | 5.475.759 |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi netto** | **-60.259.721** | **-56.231.076** |
| **ÚRSLIT AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | **-16.567.087** | **-17.283.781** |

| DKK | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| **Inntøkur av íløguaktivum** | | |
| Vinningur av kapitalpørtum í tilknýttum fyritøkum | 423.266 | 298.470 |
| Fastogn | 2.746.440 | 1.577.220 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. | 78.646.672 | 81.739.209 |
| Staðfestur vinningur av íløguaktivum | 4.409.373 | 0 |
| **Inntøkur av íløguaktivum tilsamans** | **86.225.752** | **83.614.899** |
| **Ikki staðfestur vinningur av íløguaktivum** | **4.747.441** | **4.879.774** |
| **Útreiðslur av íløguaktivum** | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | -1.914.199 | -1.105.317 |
| Rentuútreiðslur | 0 | 0 |
| Staðfest tap av íløguaktivum | 0 | -16.257.958 |
| **Útreiðslur av íløguaktivum tilsamans** | **-1.914.199** | **-17.363.275** |
| **Ikki staðfest tap av íløguaktivum** | **0** | **0** |
| **Renta flutt til tryggingarvirksemi** | **-8.613.395** | **-5.853.384** |
| **ÚRSLIT AV ÍLØGUAKTIVUM TILSAMANS** | **80.445.599** | **65.278.014** |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.418.019 | 1.225.493 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | -3.513.366 | -2.353.135 |
| **Aðrar upphæddir tilsamans** | **-2.095.348** | **-1.127.642** |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN ÓVANLIGAR UPPHÆDDIR OG SKATT** | **61.783.164** | **46.866.591** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Aðrar óvanligar upphæddir tilsamans** | **0** | **0** |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **61.783.164** | **46.866.591** |
| Skattur | -9.468.623 | -1.085.103 |
| **RAKSTRARÚRSLIT** | **52.314.541** | **45.781.488** |

Ársroknskapurin er styttur. Fullfíggjaður ársroknskapur er atkomuligur hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

## FÍGGJARSTØÐA

31. desember

**Ogn**

| DKK | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| **Íløguognir** | | |
| **Fastogn** | **66.042.889** | **61.366.018** |
| **Kapitalpartar** | | |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 16.485.149 | 16.061.882 |
| Kapitalpartar í øðrum fyritøkum | 5.210.450 | 6.424.480 |
| **KAPITALPARTAR TILSAMANS** | **21.695.599** | **22.486.362** |
| **Fíggjaríløgur** | | |
| Partabrøv | 63.953.292 | 57.862.679 |
| Lánsbrøv | 819.141.163 | 698.808.110 |
| Útlán | 244.072.227 | 289.123.463 |
| Innlán | 142.823.269 | 170.868.692 |
| **FÍGGJARÍLØGUR TILSAMANS** | **1.269.989.950** | **1.216.662.944** |
| **ÍLØGUOGNIR TILSAMANS** | **1.357.728.438** | **1.300.515.324** |
| **Áogn av tryggingarvirksemi** | | |
| Hjá tryggingartakarum | 9.697.075 | 9.060.145 |
| Hjá tryggingarfeløgum | 5.026.694 | 4.785.839 |
| **ÁOGN AV TRYGGINGARVIRKSEMI TILSAMANS** | **14.723.769** | **13.845.984** |
| **Onnur ogn** | | |
| Innbúgv, EDV-útgerð, akfør v.m. | 24.048.950 | 8.769.833 |
| Annað | 77.018 | 63.639 |
| **ONNUR OGN TILSAMANS** | **24.125.968** | **8.833.472** |
| **Tíðaravmarkingar** | | |
| Rentur og leiga tilgóðar | 14.861.713 | 16.585.751 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 3.272.284 | 3.065.386 |
| **TÍÐARAVMARKINGAR TILSAMANS** | **18.133.998** | **19.651.137** |
| **ONG TILSAMANS** | **1.414.712.173** | **1.342.845.917** |

**Skuld**

| DKK | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| **Eginogn** | | |
| **EGINOGN TILSAMANS** | **1.168.683.547** | **1.116.369.007** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| Avsett tryggingargjøld | | |
| Avsett brutto | 33.747.129 | 30.638.344 |
| Endurtryggjaranna partur | -2.726.959 | -2.203.846 |
| **Avsett tryggingargjøld netto** | **31.020.170** | **28.434.498** |
| Avsett skaðaendurgjøld | | |
| Avsett brutto | 166.487.243 | 170.486.370 |
| Endurtryggjaranna partur | -22.298.698 | -23.502.914 |
| **Avsett skaðaendurgjøld netto** | **144.188.545** | **146.983.456** |
| **TRYGGINGARTEKNISKAR AVSETINGAR TILSAMANS** | **175.208.714** | **175.417.954** |
| **Aðrar avsetingar** | | |
| Avsett til útsettan skatt | 4.297.783 | 0 |
| Avsett til eftirlønarskyldur | 8.829.336 | 10.236.006 |
| Avsett til samanleggingarkostnað | 6.314.989 | 8.189.992 |
| **AÐRAR AVSETINGAR TILSAMANS** | **19.442.109** | **18.425.998** |
| **Onnur skuld** | | |
| Skattur | 5.170.840 | 1.085.103 |
| Annað | 46.206.963 | 31.547.855 |
| **ONNUR SKULD TILSAMANS** | **51.377.803** | **32.632.958** |
| **SKULD TILSAMANS** | **1.414.712.173** | **1.342.845.917** |

### STJÓRN

**Gunnar í Liða,**
forstjóri
**Mortan Poulsen,**
stjóri

### NEVND

**Jógvan Durhuus,**
formaður
**Trygvi F. Guttesen,**
næstformaður
**Birgir Mohr,**
2. næstformaður
Jógvan Lützen
Arngerð Persson
Ronald Poulsen
Anna Maria Simonsen
Emil Simonsen
Jákup Sólstein

### GRANNSKOÐANARÁTEKNING

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Tryggingarfelagið Føroyar fyri árið 2000.

### UM GRANNSKOÐANINA

Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðanarreglur er grannskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddir og aðrar upplýsingar í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvar við roknskaparkrøv í lóggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, tann 5. apríl 2001

**Rasmussen & Weihe**
Statsaut. grannskoðarafelag P/F
Klaus Rasmussen /
*statsaut. revisor*
Joen Magnus Lamhauge
*reg. revisor*

**Grannskoðaravirkið**
***INPACT P/F***
Jógvan Amonsson /
*statsaut. revisor*
Jógvan Joensen
*cand. merc. aud.*